





# Væl ílatin á jólum




Klædnahandilin Hans Joensen á Hálsi er væl fyrireikaður til jólasøluna við nógvum tilboðum og gávuhugskotum.

Navnið Hans Joensen hevur verið eitt kent navn í handilslívinum í Havn í 121 ár og er sostatt elsti klædnahandil í Føroyum.

Gamli Hans Joensen byrjaði at handla í 1889. Hann byrjaði í smáum undir Glaðsheyggi og flutti seinni í onnur hølir undir Kletti. Í 1907 flutt hann inn í nýggjan handilsbygning í Niels Finsensgøtu, har fyritøkan helt til í mong ár.

Í dag er tað triðja ættarliði við Hans Joensen, sum eigur og rekur handilsfyritøkuna, ið heldur til við Smyrilsvegin. Talan er um ein handil, sum hevur spesialiserað seg í mannfólkaklæðum.

Hans Joensen, sum hevur verið klæðnahandilsmaður alt sítt virkna arbeiðslív, sigur, at øll eru vælkomin inn á gólvið til eitt klæðnaprát. Vit hava sum altíð nógv góð tilboð sum t.d. DIGEL klædningar og klædningsjakkar, MEJER buksur og flonelsskjúrtur til ein sera góðan prís.

At keypa klæðir er ein spurningur um álit millum tann sum selur og kundan. Vit leggja stóran dent á, at kundin kennir seg væl og er nøgdur, tá hann fer út aftur frá okkum. Tí hava vit so nógvar trúgvar kundar, sum eru nøgdir við okkara tænastu, sigur Hans Joensen, sum bjóðar øllum at verða vælkomin inn í handilin á Hálsi, har hann hevur nógv góð jólagávuhugskot.